STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

Heilsurøktarar og heilsuhjálparar til E2

Vit søkja eftir 4 avloysarum til setan 15. september ella eftir avtalu til og við 31. desember 2008 á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum. Møguleiki er fyri lægri brøki.

Búfólk á E2 verða flutt á aðrar stovnar í seinasta lagi 31. desember 2008.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 búfólkum.Vit ynskja starvsfelagar við áhuga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

Krøv til umsøkjaran
- prógv sum heilsurøktari ella heilsuhjálpari
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan eldrarøkt

Vit kunnu bjóða
- eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Monicu Brickman, deildarleiðara á E2 á tlf. 304500, lokal 6012, lsmonbr@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

Umsóknarfreistin er 8. september 2008 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn

Á Landssjúkrahúsinum
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

Lesið Sosialin -tað loysir seg

http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Námsfrøðingur til Frítíðarstovuna í Látipípuni

Søkt verður eftir námsfrøðingi til Frítíðarstovuna Látipípuna í Vestmanna at byrja 1. oktober ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.

Um eingin námsfrøðingurin søkir, verður hjálparfólk sett í starvið.

Vit vænta, at:
- tær dámar at vera saman við børnum, og at tú dugir at síggja styrkirnar hjá hvørjum einstakum barni
- tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur góð samstarvsevnir
- tú ert opin og erlig/-ur í samskiftinum við onnur

Vit kunnu bjóða:
- ein grønan stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjøru
- ein stovn, har dentur verður lagdur á alla tíðina at menna arbeiðið við børnunum
- ein starvsfólkabólk, sum er opin fyri nýggjum avbjóðingum

Lønar- og setanarviðurskifti
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Núverandi setanarstaður er Látipípan. Setanarøkið er dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Vestmanna Kommunu á tlf. 470 110 ella Einu Andreasen, leiðara, á tlf. 230 145.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum og viðmælum skal vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 3. september 2008 kl. 12.

Vestmanna Kommuna
Bakkavegur 16
Postboks 91
355 Vestmanna

Látipípan er ein stovnur við útbarnagarði til 5-7 ára gomul børn og frítíðarstovu til børn í 1.-2. flokki.

Frítíðarstovan er inni á Fjørð – tætt við Fossá, fjøruna og sandin. Dentur verður lagdur á at geva børnunum fjølbroyttar upplivingar saman við javnaldrum, og at læra tey at virða hvønn annan.

Útibarnagarðurin er í Miðalsbrekku í vøkrum náttúruumhvørvi millum Hórðará og Gjógvará – tætt við hagan.
Dentur verður lagdur á at geva børnunum upplivingar úti í náttúruni, og at búgva tey til at fara í skúla.

Føroya Barnaheim søkir húsavørð

Søkt verður eftir einum húsavørði at byrja sum skjótast.

Starvið umfatar:
- At arbeiða hálva tíð.
- Mest viðlíkahald bæði innan og uttan og annars alt fyrifallandi arbeiði.

Førleikakrøv:
Vit sóknast eftir einum fólki, ið
- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Er handaligt
- Er fyrikomandi
- Hevur koyrikort

Handverkarir hava fyrimun, men tað er einki krav.

Lønarviðurskiftir:
Starvið er lønt sambært avtalu við avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir:
Umsóknir við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi innan 8. september 2008. Merk umsóknina »Húsavørður«.

Nærri fæst at vita um starvið hjá Djóna Nolsøe Joensen, deildarleiðara, á tlf. 31 23 20 ella 22 56 72.

Føroya Barnaheim
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

Vágs Kommuna

SØKIR Reingerðingsfólk

Søkt verður eftir einum reingerðingsfólki til spælistovuna hjá Dagrøktini at byrja skjótast tilber.

Setunartreytir:
Talan er um reingerðin 2 tímar um dagin.

Starvið er lønt samsvarandi sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfeløg.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Irdi Bjarkhamar tlf. 374095/224842.

Umsóknin saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Vágs kommunu í hendi í seinasta lagi 1. september 2008 kl. 12.00.

Umsóknin skal sendast til:

VÁGS KOMMUNU
Fo-900 VÁGUR
Viðm. reingerðingsfólk

Frá Suðuroyar Siðra Javnaðarfelag

Fundur verður í hølunum hjá Vágs Matmøðrarfelag onsdagin 27. august kl. 20.

Skrá:
1. Uppstillingarfundur til býráðsvalið
2. Ymiskt

Suðuroyar Siðra Javnaðarfelag